# Odda-brak hjá kvinnum

**Toppdystur er á skránni, tá Mjølnir vitjar í Trongisvági sunnudagin**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eftir at menninir hjá Mjølnir vóru partur av oddadysti seinasta vikuskifti, eru tað hesaferð kvinnurnar, sum eiga tørn.

Tær skulu til Trongisvág, har TB – ið eisini hevur fult stigatal – spælir sínar heimadystir, og so er spurningurin, hvussu tað fer at tørna út. Enn er talan bara um grundspæl, og tí kann ikki sigast, at hesin dysturin fer at avgera nakað gullstríð. Men tað verður í øllum førum spennandi at fáa eina ábending um, hvussu hesi bæði liðini eru fyri í mun til hvørt annað.

Tveir aðrir dystir verða eisini leiktir um vikuskiftið. Báðir leygardagin.

Í Hoyvíkarhøllini tekur KÍ ímóti ÍF, og á Giljanesi verður fyri fyrstu ferð grannauppgerð í bestu deildini, tá Dráttur fer at taka ímóti SÍ.

Hjá monnunum tykist mest spennandi dysturin at standa ímillum Fleyr og SÍ. Higartil í ár hevur Fleyr staðið seg væl, men tapið í Klaksvík avdúkaði, at teir enn ikki eru heilt til reiðar at taka dystin upp við oddaliðið. Hinvegin hava úrslitini higartil í vetur bent á, at tað verða hesi bæði liðini, sum skulu stríðast um silvurið, og í so máta er talan um góða styrkisroynd sunnudagin.

Leygardagin er so dystur millum Fram og ÍF. Tey bæði liðini eru enn á niðastu sessunum, og leygardagurin fer so at gera av, hvør teirra skal standa einsamallur eftir á botninum.

# Fimleikafagnaður sunnudagin



*Kreativiteturin fær veruliga loyvi at vera í hásætinum, tá fimleikafagnaðurin er á skránni. Her er tað lívið í havinum, sum verður avmyndað á fagnaðinum fyri tveimum árum síðani*

**Um vikuskiftið verður stóri fimleikafagnaðurin í Norðurlandahúsinum. Hetta er tíggjunda ferðin, at skipað verður fyri tiltakinum, har evnið í ár er bíbliusøga**

FIMLEIKAFAGNAÐUR
*Jákup Mørk*

Fimleikfagnaðurin er eitt tað størsta tiltakið, sum Fimleikasambandið skipar fyri. Tiltakið er á skránni annað hvørt ár, og er endamálið her at vísa fimleik á ein øðrvísi hátt, enn tað vanliga verður gjørt.

Skipað verður soleiðis fyri, at feløgini fáa eitt evni, sum tey við rørslum, tónleiki og fimleiki skulu lýsa, og vanliga plagar ikki at skora upp á kreativitetin í hesum.

Evnið í ár er bíbliusøgur, og lítið er at ivast í, at talan verður um eina fjølbroytta skrá, sum feløgini fara at koma við. Valið millum mongu søgurnar í bíbliuni er nevnliga frítt, og ofta er eisini stórur munur á, hvussu ítøkiliga feløgini velja at ímynda evnið.

Fýra feløg hava í ár boðað frá luttøku til fimleikafagnaðin. Hesi eru Fimleikafelagið Flog, Havnar Fimleikafelag, Fimleikafelagið Ljósið og Fimleikafelagið Støkk.

Tríggjar framførslur eru á skránni. Leygardagin kl. 18 og sunnudagin kl. 15 og 18. Vinnarin verður kosin eftir seinastu sýningina.

Atgongumerki til tiltakið verða seld í Norðurlandahúsinum og í kunningarstovunum í Runavík, Fuglafirði og Tórshavn.

# OB og FCM vóru einastu vinnararnir

**FCK misti enn eitt fet í kappingini við oddaliðið, og Herfølge legði rygg til eyðmýkjandi stórtap í Odense**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Mikukvøldið var 14. umfarið í superliguni á skránni. Í trimum av fimm uppgerðum endaði tað javnt, meðan tveir dystir endaðu við heimasigri. Annar teirra var tann í Odense, har heimaliðið rudduliga setti Herfølge upp á pláss. Eftir bragdliga byrjan hevði tað í fleiri umførum ikki gingið nakað serligt hjá OB, men hesa ferð vunnu teir 5-0.

Hin vinnarin var AGF, sum á heimavølli vann 2-1 á AaB. Stig Tøfting var sera bragdligur á framrættaða miðvallaraplássinum hjá heimaliðnum, og hann skoraði fyrra málið. Átta minuttir undan leikloki økti AGF um leiðsluna, og tað var ikki fyrrenn í síðstu løtu, at AaB minkaði um munin.

Brøndby megnaði 2-2 í torføra útidystinum í Esbjerg. Hetta var fyrsta ferðin í fimm landskappingardystum, at Brøndby ikki fekk fult, men teir á oddaliðnum roknaðu javnleikin sum gott úrslit.

FCK var í Herning, og har taptu teir 2-0. Harvið økti Brøndby um fjarstøðuna til FCK, sum teir rokna at vera størsta kappingarneytan. 11.200 áskoðarar vóru í Herning, og teir flestu teirra vóru væl nøgdir. Hjá FCK stóð einki serligt til við fólki. Peter Møller og Bo Svensson vóru leikbannaðir, Peter Christiansen og Álvaro Santos vóru ikki við orsaka av skaða, og í 1. hálvleiki noyddust bæði málverjin, Magnus Kilhstedt, og Zuma so mikið skaddir, at teir noyddust at taka seg aftur.

FCN var á heimavøllinum í Farum frammanfyri 2-0 móti botnliðnum Randers, tá ið tað restaðu sekstan minuttir. Úrslitið gjørdist 2-2, og tað líkaði sum vera man ikki FCN venjaranum, Christian Andersen. Hann helt, at liðið hjá honum seinna partin av seinna umfarinum hevði víst, at teir so at siga høvdu gloymt, hvussu tað er at hava kós móti sigri.

Fimtanda umfarið er á skránni í vikuskiftinum. Oddaliðini Brøndby og Viborg hittast í Brøndby í dag, og Esbjerg fær í dag vitjan av AaB. Í morgin er skráin henda: Randers-Silkeborg, OB-FCN, FCM-Herfølge og FCK-AGF.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 05.11 | 19.00 | Søljan-Kyndil | Hartvig Hansen & Pole Hansen |

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 06.11 | 14.00 | Dráttur-SÍ | Mjølnir |
| 06.11 | 14.00 | KÍF-ÍF | TB |
| 07.11 | 15.00 | TB-Mjølnir | SÍ |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 06.11 | Fram-ÍF | 16.00 | Mjølnir |
| 07.11 | Fleyr-SÍ | 16.00 | Mjølnir |






# Standmynd av Maritu

Danmark eru kvinnur, sum arbeiddu fyri kvinnusakini hetjur. Eg var í føðingardegi hjá systir mínari í Keypmannahavn seinasta vikuskifti. Tá vit skuldu fara heimaftur, fóru vit av høvuðsjarnbreytarstøðini og út í Kastrup við toki. Á tí eina vegginum í tokinum var ein søga um eina av fyrstu kvinnusakskvinnunum í Danmark. Hon hevði skrivað fyrstu bókina um korini hjá kvinnun í danska samfelagnum.

Hóast bókin einans gjørdi vart við viðurskifti, sum eru sjálvsøgd í dag, misti hon arbeiði sum lærari og var útstoytt av samfelagnum og doyði undir ússaligum korum. Henda kvinna verður heiðrað sum ein hetja av danska samfelagnum ídag. Av monnum eins og kvinnum.

Eg gleði meg til tann dag, tá vit í Føroyum á sama hátt fara at heiðra tær kvinnur, sum vit kalla reyðsokkar. Tí tær hava veruliga gjørt eitt stórt arbeiði fyri okkum eftirkomarar. Fyri okkum kunnu nøkur av teirra mátum at gera tingini uppá sínast lítið feminin, og vit kunnu flenna eftir onkrum av tí tær gjørdu. Men veruleikin er, at tær millum annað gjørdu, at tað í dag er "lógligt" at ganga ílatin júst, sum vit hava hug til. Bara hesin lítli veruleiki er merkiligur at hugsa um í dag.

So má eg leggja dent á eitt afturat. Mínar royndir eru, at menn hava tikið líka væl undir við kvinnuligum politikarum sum kvinnur. Bara fyri at taka meg sjálva sum dømi: Nakrir av mínum bestu stuðlum eru menn. Fyri mær eru kvinnusakskvinnur líka stórar hetjur sum Nólsoyar Páll og Jóanes Paturson. So eg fari at skjóta upp, at Tórshavnar Kommuna reisir eina standmynd einari kvinnu, sum skal standa á góðum plássi í Havnini.

Taka vit standmyndirnar sum standa í Havnini í dag, so er eingin navngivin kvinna millum standmyndirnar. Hinvegin eru fleiri standmyndir av navngivnum monnum: Nólsoyar Páll, R.C.Effersøe, Hans Andrias Djurhuus, Rasmuss Rasmussen, Símuni av Skarði, William Heinesen og nú kemur skjótt eisini ein av Sigmundi Brestirsoni. So nú er tíðin komin at ein navngivin kvinna fær pláss teirra millum. Eg skjóti upp, at tað verður Marita Petersen.

